MENTAMÁLARÁÐIÐ

Føroya Løgting

Dagfesting: 17. desember 2009
Tygara ref.:
Máltal: 70-31101/070337 -/65

Løgtingsmál nr. XX/2009: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 34 frá 28. apríl 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

§ 1.

1) § 29, stk. *5* verður strikað.

2) § 30, stk. *3* verður strikað.

3) § 30, stk. 4 verður hereftir § 30, stk. 3.

4) § 31, stk. 1 verður orðað soleiðis*:* *"Stk. 1.* Landsstýrismanninum verður heimilað at fara undir samráðingar við kommunur um at ganga saman í skúlasambond til heilt ella lutvíst at skipa síni viðurskifti í felags skúlaøki, sum samsvara við tær eindir, sum ásettar eru í § 2 stk. 1 í løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur."

5) § 31, stk. 2 verður orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Áðrenn avgerð verður tikin smbrt. stk. 1, skulu íbúgvarnir í teimum økjum, sum skúlasambandið fer at fata um, hava havt høvi til at siga sína hugsan um málið á einum fundi, sum teir einstøku skúlamyndugleikarnir á staðnum skipa fyri**."**

6) § 31, stk. 2 verður hereftir § 31 stk. 3.

7) Sum nýtt § 31, stk. 4 verður sett: "*Stk. 4.* Um so er, at kommunurnar í skúlaøkinum ikki semjast um eina avtalu um skúlasamband í seinasta lagi 1. januar 2011, ásetur landsstýrismaðurin við virknaði frá 1. august 2011 í hvørjum skúlum í økinum, undirvísing skal verða."

8) § 32, stk. 2 verður orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin skipar á hvørjum ári læraratalið í hvørjum skúlasambandi ella skúla. Skipanin er sum meginregla grundað á upplýsingar frá tí einstaka skúlasambandinum ella skúlanum um væntað næmingatal."

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Uppskotið til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan fevnir í stuttum um hesi viðurskifti:

- Reglurnar um fólkaatkvøðu í sambandi við, at kommunalur skúli verður lagdur niður, verða tiknar av.
- Reglurnar um, at flokkar ikki kunnu umskipast, eftir at næmingarnir eru býttir í flokkar, verða tiknar av.
- Landsstýrismaðurin fær heilmild til at fara undir samráðingar við skúlamyndugleikarnar á staðnum til tess at skipa skúlasambond, sum samsvara við ásetingarnar í § 2 í løgtingslóg um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur.
- Landsstýrismanninum verður heimilað í seinasta lagi 1. januar 2011 at skipa skúlasambond við virknaði frá 1. august 2011, um so er, at kommunurnar í økinum ikki semjast um eina avtalu um skúlasamband.
- Landsstýrismaðurin skipar læraratalið í hvørjum skúl sambandi ella skúla í mun til næmingatalið.

Broytingarnar verða gjørdar fyri at útvega landsstýrismanninum fyrisitingarligar heimildir til í samstarvi við kommunurnar at broyta skúlabygnaðin, so at hann verður lagdur til rættis við tí endamáli,

- at skúlarnir verða samskipaðir í skúlasambond samsvarandi ásetingunum í § 2 stk. 1 í løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur,
- at kunna fullnýta játtanina til fólkaskúlan,
- at geva næmingunum eitt so gott og fjøltáttað undirvísingartilboð sum gjørligt,
- at virka fyri at hækka vitanarstøðið.

Tíðin er farin frá einum skúlabygnaði, har tað orsakað av truplum ferðamøguleikum var neyðugt at hava ein skúla í hvørjari bygd. Føroyar hava seinnu árini gjørt íløgur fyri túsundtals milliónir í samferðslu, vegir, tunnlar og brýr, so høgligt er at koma millum flestu bygdir. Harumframt er ein niðurstøða frá PISA-kanningunum, at við so nógvum smáum skúlum, er trupult at hava fakligan læraraførleika í øllum lærugreinum.

Eindarskúlin er ein góð og samhaldsføst skipan, sum vit eiga at varðveita. Øll skulu hava møguleika at fáa eitt skúlatilboð, sum mennir tann einstaka, og sum tekur atlit at teimum evnum og førleikum, sum tann einstaki hevur.

Skúlin skal menna bæði fakligar førleikar, sosialar førleikar og ikki minst musiskt/kreativar førleikar. Somuleiðis skal skúlin rúma øllum børnum, pláss skal vera fyri fjølbroytni og ymiskleika, har ymiskleikin skal vera ein avbjóðing og ikki ein trupulleiki. Umstøður skulu tí

Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

vera fyri næmingalagaðari undirvísing, har allir næmingar fáa eitt mennandi skúlatilboð í mun til teirra evni og áhuga.

Fyritreytin fyri, at hetta kann eydnast, er at vit fáa eina smidligari skipan viðvíkjandi skúlabygnaðinum, soleiðis at vit ikki hava so nógvar smáar skúlareindir, men at landið verður skipað í færri og størri skúlaeindir. Harumframt eru smáu skúlaeindirnar eisini kostnaðarmiklir at reka, so bæði av fakligum, pedagogiskum og fíggjarligum ávum er neyðugt at minka um talið á skúlum.

Tað er ein stór avbjóðing, at næmingarnir fáa møguleika at nýta tey evni, teir hava og at laga undirvísingina soleiðis, at næmingarnir ogna sær fakligan førleika á ymsan hátt, soleiðis at tann, ið hevur kreativar, musiskar, bókligar ella náttúruvísindaligar gávur, fær eitt undirvísingartilboð, ið er lagað til hansara førleika og áhuga. Her kunnu smáu skúlarnir vera ein forðing, tí ein fjøltáttað undirvísing setur stór krøv til læraraførleika, serliga at lærarar hava ymiskan fakligan førleika og til útgerð og læriumstøður. Harumframt er neyðugt at gera eina miðvísa íløgu í at útbúgva og eftirútbúgva lærarar og leiðslur.

Samfelagið hevur brúk fyri skapanarevnum, mentanarligari nýhugsan, íverksetaraanda og einum høgum vitanarstøði. Við nógvum smáum skúlaeindum, hava vit ikki nóg góðan møguleika at menna okkara skúlaskipan, og tað er ein meinbogi, tá ið vit vita, hvussu umráðandi holl útbúgving er fyri at menna samfelagið. Ein leið at virka fyri og tryggja, at fólkaskúlin hevur bestu menningarumstøður, er at skipa Føroyar í færri og størri skúlaeindir og sum skjótast at fara undir at gera neyðugar lógarbroytingar og aðrar fyrisitingarligar tillagingar. Landsbúskaparliga verður peningur spardur, samstundis sum næmingarnir fáa eitt betri undirvísingartilboð.

Í eini størri skúlaeind eiga næmingarnir at kunna fáa eitt fjøltáttaðari undirvísingartilboð, av tí at læraararnir í einum stórum skúla nýtast bert at undirvísa í sínum linjulærugreinum. Málið er eisini at fáa so nógvar tvílæraratímar sum til ber innan verandi fíggjarkarm. Læraararnir verða settir í fólkaskúlanum við fyribilstænastu í einum ávísum øki.

Heimild er hjá kommunum at gera sínámillum avtalu um undirvísing. Hetta verður gjørt fyri næmingar í 8., 9. og 10. flokki, men í lítlan mun fyri yngru næmingarnar.

Í skúlaárinum 2009/10 eru 57 fólkaskúlar kring landið. Næmingatalið er frá einum næmingi í tí minsta skúlanum til 491 næmingar í tí størsta skúlanum.

Skilabesta rationaliseringin liggur í at leggja skúlar saman, soleiðis at til ber at minka talið av smáum flokkum við at leggja teir saman við øðrum smáum flokkum uttan at økja samlaða flokkatalið.

Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Er talan t.d. um tveir skúlar, har næmingarnir úr báðum skúlum ikki rúmast í øðrum skúlabygninginum, ber til at nýta báðar bygningarnar á tann hátt, at t.d. teir yngru næmingarnir ganga í øðrum skúlabygninginum, og teir eldru næmingarnir í hinum skúlabygninginum.

Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

Samlaði lønarkostnaðurin hjá landinum fyri fólkaskúlan var í 2008 uml. 249 mió. kr., og var hetta bara til undirvísingarpartin. Harumframt er kostnaðurin fyri serligan tørv uml. 60 mió. kr., so samanlagt var kostnaðurin fyri undirvísingarpartin í fólkaskúlanum í 2008 uml. 310 mió. kr.

Um skúlasambond verða skipað, ber til at lækka oman fyri lýsta kostnað fyri undirvíngarpartin. Hetta er í samsvar við tilmæltu bygnaðarbroytingar á fólkaskúlaøkinum, sum tingið samtykti í Ólavsøkuuppskotinum frá juli 2009, eisini nevnt Ólavsøkupakkin.

Fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan
Verður tímajáttanin umløgd til at verða játtað økjum, ístaðin fyri sum nú, at hvør skúli fær eina tímajáttan, verður ávís sparing á fólkaskúlajáttanini, sum kann verða brúkt til aðrar námsfrøðiligar uppgávur sum økt tvílæraraskipan í byrjanarundirvísingini, skipa og menna lesivegleiðara-, og serlærara ráðgeving, fjøltáttaða eftirútbúgving, at stovna fleiri NSR-tænastur, seta eftirskúla á stovn og skipa undirvísingartilboð fyri autistar og næmingar, ið hava atferðar-, tilknýtis- og trivnaðartrupulleikar. Hinvegin verður talan um útreiðslur til øktan næmingaflutning í økinum og til møguliga bíðiløn til tænastumannasettar leiðarar, har skúlar verða lagdir saman.

Tað eru nógvar forðingar á vegnum at leggja skúlar saman. § 29, stk. 5 í galdandi lóg ger tað trupult at leggja skúlar niður. Setanarviðurskifti kunnu eisini verða ein forðing, og tað verður helst neyðugt at lækka talið av skúlaleiðarum, tá ið skúlar verða lagdir saman. Er ein lærari ella leiðari settur við ávísan skúla, kann verða trupult at flyta viðkomandi, og kanska tað gerst neyðugt at siga lærarar og leiðarar úr starvi. Í teimum førum lærarar ella leiðarar eru settir sum tænastumenn, kann talan verða um bíðiløn í trý ár, tí mega viðurskiftini í einstøku skúlunum kannast gjølla.

Fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar
Útreiðslurnar hjá kommununum til næmingaflutning hækka orsakað av øktum næmingaflutningi, og tí at landskassin framhaldandi bara fer at lata studning til flutning fyri sjúkar og avlamnar næmingar.

Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Kommurnar eiga bygningarnar, innbúgv, amboð og tól og rinda fyri undirvísingartilfar, og tí er ikki so einfalt at leggja saman skúlar tvørtur um kommunumørk, har nakrar kommunur hava sett seg í stóra skuld m.a. vegna skúlabyggingar, meðan aðrar hava gamlar skúlar, ið lítið

og einki er gjørt við. Tað er eisini ein spurningur, hvussu verður við teimum tómu skúlunum, og hvussu við møguligari millumrokning millum kommunur.

Umsitingarligar avleiðingar fyri landsmyndugleikar
Mentamálaráðið fer framhaldandi at taka sær av lógum, reglugerðum, fakligum krøvum, eftirmeting og yvirumsjón. Hvørt øki fær eina tímajáttan at arbeiða við, soleiðis at játtanin gagnar næmingunum í økinum best. Hetta er ein skilagóð skipan, bæði tá ið talan er um at fullnýta fíggjarorkuna og nýta fakliga førleikan hjá einstaka læraranum á besta hátt.

	Fyri landið/lands-myndugleikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar/felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Ja	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar				Ja- fyri næmingar og lærarar	

Kap. 3. Serligar viðmerkingar

Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Til § 1, nr. 1
Skotið verður upp at strika § 29 stk. 5, sum snýr seg um fólkaatkvøðu í sambandi við spurningin um at leggja skúlan í eini kommunu niður. Henda lógaráseting forðar fyri, at ein

skúli kann verða lagdur niður, um so er, at íbúgvararnir í kommununi krevja, at fólkaatkvøða skal haldast, um skúlin skal verða lagdur niður.

Til § 1, nr. 2
Skotið verður upp at strika § 30 stk. 3, sum snýr seg um, at flokkar ikki kunnu umskipast, tá næmingarnir á fyrsta sinni eru býttir í flokkar. Um so er, at tað av námsfrøðiligum orsøkum ella fíggjarligum ávum er neyðugt at umskipa ein flokk, kann skúlin gera hetta fyrisitingarliga.

Til § 1, nr. 3
Teknisk broyting, har § 30, stk. 4 hereftir verður § 30, stk. 3.

Til § 1, nr. 4
Skotið verður upp at broyta § 31, stk. 1 soleiðis, at heimilað verður landsstýrismanninum at samráðast við kommunur um at ganga saman í skúlasambond og sostatt heilt ella lutvíst at skipa síni skúlaviðurskifti í felags skúlaøki. Hetta skal vera í samsvari við tær kommunueindir, ið ásettar eru § 2, stk. 1 í løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur.

Til § 1, nr. 5
Ásetingin í galdandi lóg um, at íbúgvarnir í teimum økjum, sum skúlasambondini fata um, skulu hava havt høvi til at siga sína hugsan um ætlanina við skúlasambandinum, verður varðveitt.

Til § 1, nr. 6
Teknisk broyting, har § 31, stk. 2 hereftir verður § 31, stk. 3.

Til § 1 nr. 7
Sum nýtt § 31, stk. 4 verður skotið upp, at um kommunur ikki semjast um at skipa skúlasambond í skúlaøkinum í seinasta lagi 1. januar 2011, so verður heimilað landsstýrismanninum galdandi frá 1. august 2011 at áseta í hvørjum skúlum í økinum, undirvísing skal verða.

Til § 1, nr. 8
Sum nýtt § 32, stk. 2 verður skotið upp, at landsstýrismaðurin skipar læraratalið í hvørjum skúlasambandi ella skúla grundað á upplýsingar frá einstaka skúlasambandinum ella skúlanum um væntað næmingatal. Sambært galdandi lóg, skipar landsstýrismaðurin á

Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

hvørjum ári læratalið í hvørjum skúla, og talið er grundað á upplýsingar frá einstaka skúlanum um væntaða næmingatal, flokkatal o.a.

Til § 2
Skotið verður upp, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið 17. desember 2009.

Helena Dam á Neystabø
landsstýriskvinna

/Leivur Harryson
aðalstjóri

Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo